## Føroyskt met

FØROYA TELE
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

– Eg trúgvi ikki, at tað er nakar bygningur, sum er bydgur so skjótt, og sum er so kompliseraður, sigur Jóannes Niclassen, sum er høvuðsentreprenørur aftan fyri bygningin hjá Føroya Tele.

Tað tók 17 mánaðir at byggja nýggja Føroya Tele høvuðssæti. Tann 28. november 2002 varð partneringavtala gjørd við Føroya Tele, og síðani tað hevur tað gingið sum fótur í hosu. Tann 27. februar í fjør varð fyrsta kubikkið stoypt.

– Streyka var í ein heilan mánað. Tann mánaðin brúktu vit upp á at broyta ætlanirnar, soleiðis at tíðir vórðu avsettar til hvørt einstakt element. Tú visti, at tann dagin skuldi tú náa eitt ávíst mál, og næsta dagin skuldi eitt annað mál náast, sigur Jóannes Niclassen.

– Vit hava eitt yvirlit yvir allar entreprenørar, sum vísir, hvussu langt teir eru komnir. Farvukodir eru á, soleiðis at teir vita, hvar teir eru í mun til tíðarætlanina. Er tað grønt, so fylgja teir ætlanini; er tað gult, so vóru teir í vanda; og varð reytt, so vóru teir aftanfyri tíðarætlanina. Og tað er klárt, at hetta hevur eina sálarliga ávirkan á teir - ongin vil hava reytt, sigur Jóannes Niclassen.



*Soleiðis sær rúmið út inni í bygninginum hjá Føroya Tele uppi í Klingruni*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Ongin einsamallur

**Kári Dal-Christiansen er leiðari fyri stóru byggiverkætlanina hjá Føroya Tele. Hann sigur, at við nýggja bygninginum fer Føroya Tele at verða ein meira effektiv og fleksibul fyritøka**

NÝGGI BYGNINGURIN
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Føroya Tele avgjørdi fyri nøkrum árum síðani, at nýtt høvuðsæti skuldi byggjast. Nú verður alt virksemið hjá fyritøkuni á Streymoynni samlað í einum bygningi.

– Vit búgva í fleiri ymiskum støðum í Havnini, og tað er ikki altíð so arbeiðsligt. Og fyri at fáa tryggari umstøður til teknikk, ynsktu vit at fáa nýggjan bygning, sigur Kári Dal-Christiansen av Byggideildini hjá Føroya Tele.

### Einstaklingar arbeiða saman

Fyrr var Føroya Tele ein fyritøka við einstaklingum, sum arbeiddu. Tað er hon enn, men nú skulu einstaklingar á fyritøkuni í enn størri mun arbeiða saman. Tað er eitt av endamálunum við bygninginum.

– Føroya Tele verður meira og meira ein projektorienterað fyritøka. Vit vita, at tað kann verða ein fyrimunur, at vit sita í einum opnum landslagi, heldur enn at sita í hvør sínari lítlu skrivstovu. Við nýggja bygninginum eru umstøðurnar betri til at fáa eina enn meira fleksibla fyritøku, sigur Kári Dal-Christiansen.

### Rúm og nátúrligheit

Hann væntar, at tað stóra rúmið mitt í bygninginum verður ein týdningarmikil partur av gerandisdegnum hjá arbeiðsfólkunum. Hetta rúmið hevur fleiri funktiónir.

– Tað er týdningarmikið, at bygningurin hevur rúmd onkustaðni, soleiðis at proportiónirnar hanga saman. Eitt annað er, at tað stóra rúmið er ein partur av ventilatiónini, sum er nátúrlig ventilatión, sigur Kári Dal-Christiansen.

Áður hava starvfólk sitið einsamøll og arbeitt, men nú skulu mest sum øll verða í rúmi saman við fleiri persónum. Ongin fær skrivstøvu fyri seg sjálvan - heldur ikki leiðslan.

– Fleiri starvsfólk eru von við at sita á egnari skrivstovu. Tey óttast kanska eitt sindur útlitini fyri, at tey koma at sita saman við fleiri øðrum starvsfólkum, sigur Kári Dal-Christiansen.

### Meira effektiv fyritøka

Hann sigur, at fólk skulu venja seg við nýggju umstøðurnar, men til endans fer hetta at verða til tað betra.

– Nú tá bygninguin verður meira og meira liðugur, so gleða starvsfólkini seg at koma niðan. Tey hava vant seg við tankan, og tey gleðast um tað. So tey eru spent upp á at flyta niðan, sigur Kári Dal-Christiansen.

– Eg trúgvi, at Føroya Tele fer at verða meira effektivt sum fyritøka við nýggja bygninginum.



*Páll Holm Lave, arkitektur, hevur teknað við íblástri frá Rem Koolhaas og hansara sermerkta og originala arkitekturi*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



Arkitekturin:

# Nýbrot í føroyskari byggilist



*Soleiðis sær modelmyndin út av nýggja bygninginum hjá Føroya Tele*

*Mynd: Teknistovan hjá Árna Winther*

**Páll Holm Lave er arkitektur, og hann hevur vegna Teknistovuna hjá Árna Winther verið við til at skapa nýggja bygningin hjá Føroya Tele**

BYGGILIST
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Uppgávan hjá arkitektinum er ganga arbeiðsgevaranum á møti, soleiðis at Føroya Tele fær tann bygning, teir hava sett sær fyri.

– Føroya Tele hevur sjálvandi havt nøkur krøv, áðrenn alt byrjaði. Vit arbeiddu við einum seks ymiskum uppskotum, áðrenn vit komu á tað rætta, sigur Páll Holm Lave, arkitektur.

Nýggi bygningurin hjá Føroya Tele er um at verða liðugur. Páll Holm Lave sigur, at bygningurin er at líkna við ein presisan kassa, sum teir hava skorið í innan.

– Kassin er samansettur av nøkrum bygningum, soleiðis at tú fært rúmið ímillum – eitt atrium. Hetta rúmið blívur gerandisdagurin hjá starvsfólkunum, sigur Páll Holm Lave.

### Loynidómar og stóra rúmið

Alt húsið er í tveimum pørtum, sum eru knýttir saman við tí stóra rúminum – eitt atrium. Teir báðir partarnir hava hvør sína funktión.

– Tú kanst siga, at hvør hevur sína funktión. Tú hevur ein skrivstovubygning úr glasi. Og tú hevur ein teknikk-bygning, har teir hava allar sínar loynidómar í - telesentralar og annað, sigur Páll Holm Lave.

### Sum ein gomul bygd

Tað tóma rúmið, sum fyllir nógv miðskeiðis í bygninginum hevur eisini sína serligu funktión; ikki bert æstetiska, men eisini praktiska funktión. Aðalhugsanin er, at starvsfólk kunnu koma burtur frá kontóri og arbeiði.

– Tað tóma rúmið er sum ein gomul føroysk bygd: Fólkini fara út í tún. Í dag koma tey so út undir hetta stóra takið, og har er samskiftið eisini millum teknikarar, starvsfólk, og leiðslu. Ein av uppgávunum var júst at samansjóða deildir, sum nú eru eini sjey støð í býnum, sigur Páll Holm Lave.

### Ein ljós uppliving

Stóra rúmið endar í ein sunnan, har kantinan er. Suðureftir er ein stilladsbygningur uttaná, sum hevur fimm funktiónir.

– Stillads-bygningurin er ein rýmingarleið, ein góðslyft er í, hann skal verða lýsingarveggur, hann tekur sólarhita, og síðani hevur stillads-bygningurin uttan á eina skugga-effekt á veggirnar inni í bygninginum. Tú sært relief av trappum og øðrum. Tá sólin er frammi, fært tú eina uppliving av, at stilladsið kemur inn í bygningin - tað er eitt skiftandi mynstur, sigur Páll Holm Lave.

### Menniskjan og modernisman

Bygningurin er gjørdur við starvsfólkinum og menniskjanum í sentrum. Umframt eitt atrium skiftir tilfarið á hornunum. Har er bæði glas, stál og betong. Bygningurin er modernistiskur.

– Men vit eru inspireraðir av nýggjum, niðurlendskum arkitekturi. Serliga er tað Rem Koolhaas og hansara teknistova OMA, sum vit fáa íblástur frá, sigur Páll Holm Lave, arkitektur hjá Teknistovuni Árni Winther.

## Originalur frá Harvard

**Rem Koolhaas er mettur at vera so originalur, at onki av hansara arbeiði er treytað av øðrum stílum ella tættum innan arkitektur**

ALTJÓÐA BYGGILIST
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Páll Holm Lave hevur teknað nýggja bygningin hjá Føroya Tele. Hann sigur, at teir á Teknistovuni hjá Árna Winther serliga hava fingið íblástur frá niðurlendska Rem Koolhaas. Tann 59 ára gamli Rem Koolhaas er professari í arkitekturi við lærda háskúlan Harvard í USA.

### Museum of Modern Art

Hann verður mettur sum ein av teimum mest originalu arkitektunum í heiminum. Í 1994 hevði hann eina framsýning í New York City á tí víðagitna Museum of Modern Art. Grundhugsanin hjá Rem Koolhaas er, at gransking ruddar slóð fyri arkitekturi.

– Ágrýtni í gransking er inngangurin til arkitektur. Hetta eru tvey ting, sum eru knýtt sterkt at hvør øðrum. Umstøður broytast ótrúliga skjótt uttan eitt áhaldandi samband millum hendingarnar. Arkitekturur verður eitt meira og meira óhóskandi arbeiðslag, sigur Rem Koolhaas við The Harvard Gazette. Hann sigur, at ein arkitektur hevur onki tamarhald á næstu verkætlanini.

– Tískil veitst tú ongantíð, hvat títt næsta arbeiði verður við - hvørt tað er við einum átrúnaði, einum fongsli ella við Heims Bankan, sigur Rem Koolhaas.

Eygleiðarar meta, at Koolhaas og hansara stílur er so originalur, at hansara rúmd (sí bygningin hjá Føroya Tele) ikki er treytað av øðrum tættum innan arkitektur. Koolhaas er nevniliga ikki nógv fyri postmodernismu.

### Post-modernisma ikki modernað

– Tað er mítt ástøði, at post-modernisma hevur onki við stíl ella æstetik at gera. Tað er bert ein máti at framleiða arkitektur upp á minni tíð við minni sofistikatión, sigur Rem Koolhaas við The Harvard Gazette.

Rem Koolhaas heldur, at arkitektar ístaðin áttu at granska eina og hvørja støðu, sum teir koma í, eitt nú við bygninginum hjá Føroya Tele. Hervið finna teir útav, hvat fyri serligar eginleikar tann einstaka støðan hevur, og síðani skulu arkitektarnir fara í holt við sjálvt arbeiðið. Gransking kemur áðrenn arkitektur, er aðalhugsanin.

*Kelda: The Harvard Gazette, 6. juni, 1996*

## FAKTA

750 fermetrar eru á hvørjari av teimum trimum skrivstovuhæddunum. Samlaði bygningurin er upp á 6600 fermetrar. 35 fólk koma at sita á hvørjari hædd. Kontraktin við entreprenørar og ráðgevar er 93 milliónir krónur. Hartil kemur keyp av grundstykki, byggibúning og veitingar frá Føroya Tele. Samlaði kostnaðurin, sum Føroya Tele skal gjalda, verður nakað meira enn 100 milliónir krónur. Hetta verður fíggjað við sølu av øðrum bygningum og partvís við lántøku.

Arkitektur er Páll Holm Lave frá Teknistovuni hjá Árna Winther. Jóannes Niclassen frá MTHøjgaard er høvuðsentreprenørur. Landsbyggifelagið hevur gjørt stál- og betongprojektini. Sofus M. Jacobsen hevur staðið fyri VVS-projektinum, og COWI hevur tikið sær av elprojekteringini.

Bygningurin varð handaður Føroya Tele tann 30. juni í ár. Í august mánaði flytir Føroya Tele inn í bygningin. Arbeitt verður fram ímóti einari almennari móttøku tann 27. august.